Skills 4 ReUse | Nordic Sustainable Construction

# Læraravegleiðing: 2.2.3 Hvar kann tilfarið nýtast?

**Tema**

- Endurnýtt tilfar
- Lóggáva
- Nýtsla
- Snið

**Mælt tíðarskeið**

180 min.

**Viður**

Undirvísingartilfartil skeið um endurnýtsluviður í bygging

## Innleiðsla

Endamáli við venjingini at geva lærlinginum innlit í, hvussu sermerk lærugreina endurnýtslutilfar kunnu tvinna saman. Lærlingurin lærir um, at viðgerð av tilfari kann vera neyðug fyri at loysa uppgávuna. Lærlingurin kannar, hvat lóggávan sigur í tí ávísa landinum. Venjingin er tengd at sjónbandinum um lóggávu eldi og statikki.

## Fyrireiking

Lærarin skal:

•Kunna um tilfarið/gongdina

•Seta lærlingin í gongd við uppgávuna

•Hjálpa lærlinginum við uppgávuni

Luttakarin skal:

•Lurta og skilja uppgávuna

•Leita eftir upplýsingum um lóggávu og nýtslumøguleikar

•Gera skitsur og lýsingar

•Taka ímóti afturboðum frá lærarinum

Skipan

Undirvísingin er ein blanding av einstaklingar arbeiði og bólkaarbeiði. Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini einsamallir ella í smærri bólkum.

# Læraravegleiðing: 2.2.3 Hvar kann tilfarið nýtast?

**Læringamál**

- Lærlingurin kann koma við uppskotum um, hvussu endurnýtt tilfar kann sameinast í eina serstaka uppgávu (H2).
- Lærlingurin kann grundgeva fyri, hví fýra serstøk lærugreina tilfar eru hóskandi til endurvinning (H2).
- Lærlingurin hevur vitan um, hvussu trætílfar kann tillagast og viðgerast til endurnýtslu ella endurvinning í trækonstruktiónum (V1).

**Innihald og endamál**

Í hesi venjingini skal lærlingurin handfara eina mongd av tilfari frá eini selektivari niðurtøku, sum skal sameina í eina ávísa uppgávu. Lærlingurin skal grundgeva fyri, hvussu best er at viðgera og nýta tilfarið, umframt hvat lóggávan sigur í tí ávísa landinum. Venjingin inniheldur skitsutekningar og lýsingar, sum verða lagdar fram fyri flokkinum.

**Uppskot til undirvísingarætlan**

Framløga hjá læraranum (5 min)

- Framløga av læringaevninum á heimasíðuni
- Seta næmingarnar í gongd við uppgávuna

Einstaklinga arbeiði (40 min)

- Lærlingurin lesur uppgávuna á heimasíðuni
- Lærlingurin kemur við hugskotum og uppskotum um, hvussu tey fýra endurnýttu tilfarini kunnu nýtast.

Arbeiði í bólkum av 2-3 persónum (105 min)

- Bólkurin av 2-3 persónum, skulu vísa hvørjum øðrum síni hugskot og skitsufyrispurningar.
- Kjakið um møguleikar, fyrimunir og vansar við ymiskum skitsufyrispurningum.
- Veljið eina skitsu, sum tit vilja arbeiða víðari við í bólkinum.
- Haldið á við at tekna uppá valda hugskotið, og kannið fleiri upplýsingar um møguleikar, lóggávukrøv og nýtslu av endurnýttum træi í bygging. Finnið út av, hvar vørurnar best kunnu nýtast.
- Gerið endaligar skitsur av tykkara hugskoti til eina bygging ella ein byggipart.

Framløga og endi (30 min)

- Leggið tykkara endaligu hugskot og skitsufyrispurningar fram fyri flokkin og læraranum.
- Metið modulið í flokkinum og komið við uppskotum til betranir.

# Læraravegleiðing: 2.2.3 Hvar kann tilfarið nýtast?

## Sundurgreining

Umfatningin og grundigheitin kunnu variera.

## Feedback og samanumtøka

Lærarin gevur samanhangandi afturmelding til lærlingarnar undir arbeiðinum og at enda.